# SEV er ov tungt at dansa við

**SEV eigur at verða umskipað so at tað verður lættari at arbeiða, heldur Leivur Hansen, sum framvegis metir seg vera formann í SEV-stýrinum. Tað er leiðslan í SEV, sum er tung at dansa við, heldur Hans Tausen Olsen, formaður í umboðsráðnum**

SEV-ÓSEMJA
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Allar kommunur eiga SEV og tí má ongin kommuna útihýsast frá at hava ávirkan. Ein máti kundi verið at fækkað talið av stýrislimum, heldur Hans Tausen Olsen, sum her á á fundi í stýrinum*

– SEV eigur at verða umskipað, so at tað verður lættari at arbeiða

Leivur Hansen, sum framvegis metir seg at vera formann í SEV-stýrinum, heldur, at soleiðis sum SEV er skipað nú, er tað alt ov tungt at dansa við.

SEV hevur eina leiðslu. Harafturat er eitt stýri við sjey limum, har ein er úr hvørjum øki í Føroyum. Men harumframt hevur SEV eina umboðsnevnd, har hvør kommuna í Føroyum hevur ein lim fyri hvørjar upp á byrjað túsund fólk. Tað merkir, at ein kommuna við 10 fólkum hevur ein lim í umboðsráðnum og ein kommuna við 1100 fólkum hevur tveir. Havnin hevur sostatt 20 limir í umboðsnevndini.

Í løtuni eru sostatt 70 limir í umboðsnevndini.

### Avoldað skipan

Leivur Hansen heldur, at hetta er ein virkisskipan, sum er alt ov tung at arbeiða við og at tað tí er neyðugt at umskipa SEV.

– Bygnaðurin, sum nú er í SEV, er ósmidligur og avoldaður.

Hann tekur tí fult undir við, at SEV verður umskipað. Hann hevur eisini talað fyri, at stýrið tekur spurningin um bygnaðin í SEV, upp til viðgerðar

Men hann sigur, at harðasti mótstøðumaður ímóti at umskipa SEV, hevur júst verið Hans Tausen Olsen, formaður í umboðsnevndini.

Spurningurin er so, hvussu SEV eigur at verða umskipað, men tað dugir Leivur Hansen ikki at siga í løtuni.

– Tað er ein spurningur, sum eigarin eigur at taka upp. Og tey, sum eiga SEV, eru allar kommunurnar í Føroyum.

Eitt, sum hevur verið nevnt, er at umskipa SEV til eitt okkurt slag av partafelagi, ella í okkurt felag, sum líkist einum partafelag.

– Eg haldi, at kommunurnar eiga at taka málið upp og at lýsa fyrimunir og vansar við tí, heldur Leivur Hansen.

### Mugu hava ávirkan

Hans Tausen Olsen, formaður í umboðsnevndini, avsannar, at hann er ímóti at broyta bygnaðin í SEV.

– Tað er akkurát tað, sum liggur fyri framman at umskipa SEV.

Men nær tað verður og, hvussu SEV verður umskipað, dugir hann ikki at síggja.

Annars er tað umboðsnevndin, sum skal góðkenna slíkar umskipingar.

Tað hevur verið tosað um at gera SEV til okkurt slag av partafelag.

– Tað vil eg síggja fyrimunirnar við fyrst, áðrenn eg taki undir við tí. Tosað vit um eitt partafelag, skulu vit bæði betala skatt, eins og onkur skal hava vinning burturúr tí og eg veit ikki um tað er tað rætta.

Hinvegin vísir Hans Tausen Olsen á, at tað eru kommunurnar sum eiga SEV og teir einstøku kommunurnar mugu eisini framyvir hava eitt orð at siga í SEV.

– Tí kann ongin kommuna útihýsast úr einum umboðsráði, tí SEV má altíð verða ein samhaldsfastur felagsskapur. Tað hevur sera stóran týdning, haldi eg.

Hann heldur, at ein máti kundi verið at broytt fortreytirnar fyri, hvussu nógvir umboðsnevndarlimir skulu vera, men tað má ikki gerast so, ein einstakar kommunur ongan lim fáa.

– Annars fækkar talið á kommunum, so talið á umboðsnevndarlimum fer at minka eitt sindur av teirri orsøk.

– Umboðsnevndin kann minkast, hon hon má altíð hava minst ein lim úr hvørjari kommunu. Og umboðsnevndin kemur altíð at hava minst ein ársligan aðalfund, tí kommunurnar eiga SEV.

Annars Hans Tausen Olsen púra ósamdur í, at tað er umboðsráðið, sum er orsøkin til óskilið í SEV.

– Tað er ikki tann politiska skipanin í SEV, sum er ein vansi. Umboðsnevndin er saman nakrar fáar ferðir um árið at góðkenna fíggjarætlanir og onnur, yvirskipað viðurskiftið, umframt tey mál, sum verða løgd fyri nevndina. Annars er tað stýrið, sum hevur alt vald at stjórna SEV ímillum umboðsnevndarfundirnar.

– Teir trupulleikar, sum eru í SEV, stava tískil frá teirri umsitingarligu leiðsluni. Er SEV tungt at dansa við, er tað sostatt umsitingarliga leiðslan, sum er tung at dansa við og ikki umboðsnevndin.

– Ein máti kundi tí eisini verið at fækka talið á stýrislimum, heldur Hans Tausen Olsen.

# Hans Tausen Olsen er upphavið til stríðið í SEV



*Hans Tausen Olsen hevur meir at gera við ósemjuna, enn hann letst, heldur Leivur Hansen, í miðjuni*

**Órsøkin til ósemjuna í SEV er gamalt agg mótvegis stjóranum, sigur Leivur Hansen**

SEV- ÓSEMJA
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Tað er ongin ivi um, at tað er Hans Tausen Olsen, formaður í umboðsnevndini, sum er upphavsmaðurin til stríðið, sum nú er í SEV.

Tað staðfestir Leivur Hansen, sum framvegis metir seg vera formann í stýrinum fyri SEV.

Hann gevur tískil ikki nógv fyri uppáhaldið hjá Hans Tausen Olsen um, at hann er ikki partur í málinum, nú ætlanin er at siga Klæmint Weihe upp sum stjóra í SEV.

– Tað er heilt týðiligt, at Hans Tausen Olsen er rættiliga stórur partur í málinum. Hann hevur eisini boðað frá, at hann tekur undir við meirilutanum í stýrinum um at siga SEV-stjóran upp.

Leivur Hansen heldur enntá, at tað er heilt týðiligt, at tað er Hans Tausen Olsen, sum er upphavsmaður til ósemjuna í SEV.

Leivur Hansen metir, at stríðið í SEV botnar í persónligum aggi ímillum partar í stýrinum og umboðsnevndarformannin øðrumegin, ímóti stjóranum.

Hann sigur, at hann varð valdur í stýrið í februar í fjør og tá byrjar hansara samstarv við stjóran í SEV.

– Tað samstarv, eg havi havt við Klæmint Weihe síðani tá, hevur verið gott og gevur als onga orsøk til at siga hann upp.

– Men tað verða ymisk gomul mál tengd upp í, sum nú verða brúkt ímóti stjóranum.

Hann sigur sostatt, at hóast ósemjan ikki brýtur út, fyrrenn nú, er hon alt annað enn nýggj.

Leivur Hansen vísir kortini á, at Hans Tausen Olsen hevur verið formaður í umboðsnevndini síðani 1993 og tískil hevur hann havt allar møguleikar at fáa stjóran frá.

Men tað er onki hent, fyrrenn nú og nú skuldi alt avgreiðast upp á eina onga tíð.

Hann vil kortini ikki útgreina hetta nærri.

– Tað fara vit at bíða við, til umboðsnevndarfundur verður, tí tá fara vit at greiða umboðsnevndarlimum frá støðuni.

Hans Tausen Olsen hevur ongar viðmerkingar til hesar skuldsetingar.